*Sjálvt teir mest inniligu og vælskrivaðu sálmarnar frá eini farnari tíð fær hann latið í ein slíkan búna, at sjálvt ung nútíðarmenniskju geva sanginum – og boðskapinum! – gætur.*

*Harmur og gleði í felag tey reika,*
*eydna, óeydna tær ganga á rað.*
*Viðrák og mótrák tey skiftandi leika,*
*sólskin og skýggj ferðast saman í lag!*
*Jarðgull sum hold*
*er føgur mold,*
*himinin eina er sælunnar fold.*

*1. ørindi. Kingo yrkti í 1681. Chr. Matras týddi í 1921)*









**Eg livi**

Seinasti sangurin í hesum umfarinum er eisini ein úr gamla sangskattinum. Ein kendur hjá A.P. Berggren.

– Er tað nakar sum veit, nær hann er føddur? Eingin ... Hetta er sum ein spurnarkapping.

– Eg minnist tað heldur ikki beint nú. Sama ger. Her kemur so »Eg livi og veit«, sigur Heine.

Hann hevur fingið at vita, at hann hevur bert tveir minuttir eftir. Tað ger einki, tí sangurin gongur í skjótum tempo.

Heine er liðugur við sín part av konsertini. Nú skal skiftast til næsta tónleikabólkin – teir ungu menninar í Proclaim.

Hóast teirra sangur er harðari og tað nógva er á enskum máli, so er eisini teirra ynski at bera andaligan sang fram í nýggjum búna!

Hetta er onnur greinin frá ársins gospeltúri. Fyrsta greinin stóð í Sosialinum nr. 88. Fleiri koma seinni!